Januar 2022

**Kunning um viðgerð av persónupplýsingum í BankNordik**
BankNordik er ein fíggjarstovnur, sum veitir fíggjarliga ráðgeving og tænastur til kundar sínar. Sum partur av rakstrinum av fyritøkuni verða upplýsingar um kundar bankans (persónupplýsingar) viðgjørdar. Vit taka øll neyðug stig fyri at verja tínar persónupplýsingar í samsvari við galdandi lóggávu. Niðanfyri kanst tú lesa meira um, hvussu BankNordik verjir tínar persónupplýsingar og lógartryggjaðu rættindi.

**Hví skráseta og viðgera vit tínar persónupplýsingar?**
Vit skráseta og brúka tínar persónupplýsingar fyri at kunna veita tær best møguligu ráðgevingina og tænasturnar, fyri at verja teg ímóti sviki, fyri at halda avtalur við teg og fyri at halda tey lógarkrøv, sum eru áløgd okkum sum fíggjarstovnur. Tað merkir, at vit skráseta og brúka persónupplýsingar, tá:

- Tú hevur gjørt ella umhugsar at gera eina avtalu við okkum um, smb. DVL § 8, stk. 1, nr. 2. [1]
- Tú hevur givið okkum samtykki til at viðgera tínar persónupplýsingar til eitt ella fleiri nágreinað endamál, smb. DVL § 8, stk. 1, nr. 1.
- Tað sambært lóg er álagt okkum at viðgera ávísar persónupplýsingar, t.d. sambært
  - Hvítvasklóggávu
  - Skattalóggávu
  - Roknskaparlóggávu
  - Kredittavtalulóggávu
  - Lóggávu um fíggjarligt virksemi
  - Dátuverndarlóggávu
- Tá tað er neyðugt fyri av røttum at kunna fylgja heimilaðum áhugamálum hjá BankNordik, smb. DVL § 8, stk. 1, nr. 6. Tað kann t.d. vera fyri at fyribyrgja misnýtslu ella missi ella fyri at styrkja KT- og gjaldstrygdina. Í hesum sambandi viðgera vit einans tínar persónupplýsingar, um okkara áhugamál greitt viga tyngri enn fyrilitini fyri tær, við serligum denti á tínum áhuga í, at vit ikki viðgera tínar persónupplýsingar.

**Hvørjar persónupplýsingar skráseta og viðgera vit?**
Vit skráseta og viðgera ymisk sløg av persónupplýsingum treytað av, hvørjum veitingum ella tænastum tú fært ella ert áhugað/ur í at fáa, herundir:

- Grundleggjandi persónupplýsingar, t.d. títt navn, bústað, telefonnummar, teldupostbústað
- P-tal fyri at eyðmerkja teg - hetta verður gjørt við heimild í hvítvasklóggávuni
- Fíggjarligar upplýsingar, t.d. um tína inntøku, trygdir, skuld og ognir
- Upplýsingar um tína útbúgving, títt arbeiði ella vinnuvirksemi
- Upplýsingar um tína familju og húsarhald
- Samleikaprógv, t.d. avrit av passi, koyrikort ella navnabrævi
- Upplýsingar um tær veitingar og tænastur, sum vit veita tær, herundir um hvussu tú brúkar tær
- Allar upplýsingar, viðmerkingar og boð, sum tú skrivar í netbankanum, tá tú gert ella skrásetir eina flyting ella gjald, t.d. tá tú skrivar boð til móttakara ella skrásetir upplýsingar viðvíkjandi eini flyting við funkuni “egin tekstur” í netbankanum. Hesar upplýsingar kunnu

[1] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum

seinni verða viðgjørdar av bankanum, um illgruni er um, at flytingin kann hava samband við hvítvasking av peningini ella fígging av yvirgangi

Okkara førleiki at veita tær best møguligu ráðgevingina í mun til tín tørv er í ávísan mun tengdur at, hvussu væl vit kenna teg. Tí er tað týdningarmikið, at tær upplýsingar, sum tú letur okkum, eru rættar og neyvar, og at tú kunnar okkum um møgiligar broytingar í viðurskiftum, sum upplýsingarnar viðvíkja.

**Viðkvæmar persónupplýsingar**

Sambært dátuverndarlógini eru ávísar persónupplýsingar viðkvæmar. Viðkvæmar persónupplýsingar skulu sambært lógini verjast serliga væl. Upplýsingar um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, fakfelagstilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti, verða roknaðar sum viðkvæmar upplýsingar.

Vit skráseta og viðgera bara viðkvæmar persónupplýsingar í tann mun, tað er neyðugt fyri at kunna geva tær ráðgeving ella bjóða tær eina tænastu ella veiting. Tá tað er neyðugt at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar biðja vit um títt samtykki, um viðgerðin ikki er lógarheimilað, lógarkravd ella er neyðug fyri at gera eitt rættarkrav galdandi.

Viðkvæmar persónupplýsingar, sum vit skráseta, eru m.a.:

- Upplýsingar um fakfelagstilknýti
- Upplýsingar um tína heilsustøðu

*Serliga viðvíkjandi flytingum:* Fyri at kunna veita fíggjartænastur, t.d. fyri at fremja flytingar og gjaldingar, verða upplýsingar um hesar skrásettar í skipanum okkara, og tí slepst ikki undan, at vit í ávísum førum skráseta viðkvæmar upplýsingar, t.d. um fakfelagstilknýti, tá tú rindar limagjald, politiska sannføring, t.d. tá tú rindar limagjald til politiskan felagsskap, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring, t.d. tá tú rindar limagjald til átrúnaðarligan ella heimspekiligan felagsskap, kynsliga sannføring, t.d. tá tú rindar limagjald til áhugafelagsskapir e.t. Um tú velur at knýta viðmerkingar ella boð viðvíkjandi áðurnevndu viðurskiftum til móttakara til eina flyting, verður viðmerkingin ella boðini eisini skrásett í skipanum bankans. Hesar upplýsingar kunnu seinni verða viðgjørdar av bankanum um illgruni er um, at flytingin kann hava samband við hvítvasking av peningi ella fígging av yvirgangi.

**Hví og hvussu skráseta og viðgera vit tínar persónupplýsingar?**

Vit skráseta og viðgera persónupplýsingar í sambandi við, at vit veita fíggjarligar tænastur og veitingar, herundir:

- Gjaldstænastur
- Kontur
- Lán og kredittir
- Talgildar bankaloysnir (t.d. netbanki á teldu og fartelefon)
- Íløguveitingar og –ráðgeving
- Tryggingarveitingar

Vit skráseta og viðgera eisini persónupplýsingar í sambandi við annað virksemi viðvíkjandi ávísum tænastum og veitingum, herundir:

- Kundatænastu, kundanøgdsemi, ráðgeving, umsiting og undirvísing í hesum viðurskiftum
- Kredittmetingar
- Menning, greining og umsiting av okkara tænastum, veitingum, skipanum og virksemi
- Marknaðarførsla av okkara tænastum og veitingum

- Fyri at áseta ómaksgjøld og prísir
- Eyðmerking og góðkenning av kundum
- Váðastýring
- Innheintan av skuld
- Fyri at verja teg og BankNordik móti sviki
- Fyri at lúka lógarkrøv

Vit innsavna upplýsingarnar beinleiðis frá tær ella við at eygleiða tínar gerðir, t.d. tá:

- Tú fyllir út umsóknir ella onnur oyðubløð í sambandi við bílegging av tænastum og veitingum
- Tú sendir okkum skjøl
- Tú ringir til okkum. Vit kunna teg, áðrenn samrøðan verður bandað. Okkum er álagt at banda og goyma telefonsamrøður, sum snúgva seg um íløgutænastur.
- Tú brúkar okkara heimasíðu, appir, tænastur og veitingar
- Tú luttekur í kundakanningum ella átøkum, sum vit skipa fyri

**Hvussu leingi goyma vit tínar persónupplýsingar?**

Vit goyma tínar persónupplýsingar, so leingi tað er neyðugt í mín til tey endamál, sum upplýsingarnar vórðu innsavnaðar til. Vit goyma tí tínar persónupplýsingar so leingi, vit veita tær eina fíggjarliga tænastu ella veiting. Tá títt kundasamband við okkum er slitið, goyma vit vanliga tínar upplýsingar í 5 ár afturat. Hetta gera vit fyri at lúka krøv í roknskaparlóggávu, hvítvasklóggávu og krøv frá Fíggjareftirlitinum. Í ávísum førum goyma vit tínar upplýsingar longur, t.d.:

- Um tínar upplýsingar skulu brúkast í útrokning av okkara kapitalkrøvum, kunnu vit goyma tær í upp til 20 ár
- Um fyrningarfreistin í sambandi við avtalu um eina tænastu ella veiting er 10 ár, kunnu vit goyma upplýsingarnar í 10 ár

**Triðjapartar og tínar persónupplýsingar**

***Persónupplýsingar frá triðjaparti***

Vit skráseta og viðgera persónupplýsingar, sum vit móttaka frá triðjaparti, herundir frá:

- Handlum, bankum, gjalds- og tænastuveitarum, tá tú brúkar tíni gjaldskort, netbankan ella aðrar gjaldstænastur. Vit skráseta og viðgera upplýsingarnar til at fremja gjaldingar og gera kontuavrit, gjaldsyvirlit og líknandi
- Landsfólkayvirlitinum og øðrum almennum keldum og skráum. Vit skráseta og viðgera upplýsingarnar t.d. fyri at eftirkanna neyvleikan av upplýsingum um teg
- Feløg í BankNordik-samtakinum (P/F Trygd, P/F Skyn) til umsitingarligar uppgávur, umframt kredittmetingarfyritøkur og ávaringarskráir
- Feløg í BankNordik-samtakinum umframt samstarvsfelagar (herundir viðskiftabankar og aðrar bankar), um tú hevur givið títt samtykki, ella vit hava lógarheimild til tað. Vit skráseta og viðgera upplýsingarnar t.d. til at geva tær atgongd til at brúka bankatænastur, tá tú ert uttanlands

***Triðjapartar, sum vit deila tínar persónupplýsingar við***

Vit deila í ávísum førum tínar persónupplýsingar við triðjapartar í og uttan fyri BankNordik-samtakið:

- Um tú hevur biðið okkum flyta eina upphædd til annan móttakara, lata vit tær upplýsingar um teg víðari, sum eru neyðugar fyri at eyðmerkja teg og fremja flytingina
- Vit lata upplýsingar um teg víðari, tá tað er álagt okkum við lóg, herundir til Ríkisákæran fyri serlig fíggjarlig og altjóða brotsverk (SØIK) í samsvari við hvítvasklóggávu, til

skattamyndugleikar í samsvari við skattalóggávu og til almennar myndugleikar til hagfrøðilig endamál

- Vit lata upplýsingar um teg víðari í BankNordik-samtakinum og til uttanhýsis samstarvsfelagar (herundir viðskiftabankar og aðrar bankar, umframt tá vit gera kundanøgdsemiskanningar), um vit hava títt samtykki ella ein lógarheimilaðan rætt ella heimild til tess
- Vit lata upplýsingar um teg víðari til kredittmetingarfyritøkur og ávaringarskráir. Um tú misheldur tínar skyldur yvirfyri BankNordik, kunnu vit skráseta teg hjá kredittmetingarfyritøkum og/ella ávaringarskráum í samsvari við galdandi lóggávu á økinum
- Í sambandi við KT-menning, hýsing, rakstur, sakstýring, tænastuveiting og marknaðarførslu flyta vit persónupplýsingar til dátuviðgerar. Vit tryggja, at tíni rættindi eru vard, og at trygdarstigið er nøktandi í sambandi við tílikan flutning av upplýsingum

**Flutningur til móttakarar í útlondum, triðjalondum ella í millumtjóðafelagsskapum**
Í sambandi við KT-menning, hýsing, rakstur, sakstýring, tænastuveiting og marknaðarførslu flyta vit persónupplýsingar til dátuviðgerar. Tá ið vit lata víðari upplýsingar til dátuviðgerar, verður hetta gjørt í samsvari við skrivligar dátuviðgeraravtalur. Vit tryggja, at tíni rættindi eru vard, og at trygdarstigið er nøktandi í sambandi við tílikan flutning av upplýsingum. Tá vit flyta persónupplýsingar til útlond,  triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir verður hetta altíð gjørt í samsvari við kapittul 6 í dátuverndarlógini.

**Profilering og sjálvvirkandi avgerðir**
***Profilering***
Profilering er eitt slag av sjálvvirkandi viðgerð av tínum persónupplýsingum. Vit brúka t.d. profilering og datamodellering til at bjóða tær ávísar tænastur og veitingar, sum samsvara tínum viðurskiftum, til váðameting, til at fyribyrgja hvítvasking av peningi ella fígging av yvirgangi, til at áseta prísir og ómaksgjøld, til at avdúka svik og meta um váða í sambandi við svik, til at meta um sannlíkindi fyri mishaldi, til virðisáseting og til marknaðarførslu.
***Sjálvvirkandi avgerðir***
Okkara skipanir kunnu í ávísum førum sjálvvirkandi fremja avgerðir við støði í teimum upplýsingum, sum vit hava um teg. Vit brúka t.d. sjálvvirkandi avgerðir til at fremja produktskifti, segmentskifti og til at senda brøv treytað av tínum aldri.

Vit fremja harumframt fylgjandi sjálvvirkandi viðgerðir:

- **Creditscore:** Allir kundar okkara fáa sjálvvirkandi tillutað sonevnt creditscore við støði í ymsum faktorum, t.d. kontoatburði, troti, lánisamanseting, gildistíð, tøkum peningi o.s.fr. Creditscore er ein meting av sannlíkindunum fyri, at fíggjarligar skyldur mótvegis bankanum verða mishildnar innan fyri næstu 12 mánaðirnar við støði í atburði kundans undanfarnu 12 mánaðirnar. Creditscore verður dagført mánaðarliga og verður nýtt fyri nýggjar kundar eftir 6 mánaðir. Creditscore er partur av kredittmetingini av privatkundum, men verður aldrin nýtt sum einasta grundarlag fyri avgerðum.
- **Anti-hvítvask váðameting:** Upplýsingar um pengingarensl, t.d. flytingar o.l. á kontum, og kontuvirksemi verða sjálvvirkandi viðgjørdar, og verða við støði í ávísum eyðkennum, t.d. tal av kontantinngjøldum í einum ávísum tíðarskeiði, nýtt til at gera eina váðameting, sum býtir kundarnar upp í váðabólkar í mun til sannlíkindini fyri, at bankin verður misnýttur til hvítvask ella fígging av yvirgangi. Hesir váðabólkar verða nýttir í sambandi við menniskjaliga viðgerð av illgrunaverdum transaktiónum, transaktiónsmynstrum ella

illgrunaverdum atburði annars við tí fyri eyga at melda tílíkar transaktiónir ella atburð til Ríkisákæran fyri serlig fíggjarlig ella altjóða brotsverk (SØIK).

- **Sjálvvirkandi trotaviðgerð:** Tá ein kundi hevur trot á eini kontu, verður hetta viðgjørt sjálvvirkandi, tá trotið er innan fyri eitt lægsta- og hægstamark, sum er ásett við støði í creditscore hjá kundanum. Tá trotið er innan fyri ásettu mørkini verður t.d. ein áminning ella rykkjari send/ur sjálvvirkandi.

**Tíni rættindi**
Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í samband við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

- **Rætturin til innlit**: Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg.
- **Rætturin til rætting**: Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálvan rættaðar.
- **Rætturin til striking**: Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu striking.
- **Rætturin til viðgerðaravmarking**: Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir í útgangsstøðinum bert goyma persónupplýsingarnar.
- **Rætturin til dátuflutning**: Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónupplýsingar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanligum nýttum og teldutøkum sniði, og at fáa hesar persónupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.
- **Rætturin til mótmæli**: Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.
- **Rætturin til ikki at vera fyri individuellari avgerð**, sum einans er grundað á automatiska viðgerð

Umbønin verður svarað skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at hon er móttikin. Um serstøk viðurskifti so sum nøgd og torgreidni gera, at tað er ógjørligt at svara umbønini innan 4 vikur, kann tíðarskeiðið leingjast við 8 vikum. Tú fært serstøk boð frá okkum, um freistin verður longd, og tá umbønin er svarað.

**Samband og kæra**
Tú ert vælkomin at seta teg í samband við okkum, um tú hevur spurningar um tíni rættindi, ella um hvussu vit viðgera tínar persónupplýsingar. Tú kanst seta teg í samband við okkara dátuverndarfólk:

*Teldupostur:* dpo@banknordik.fo
Oknarvegur 5, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn
Tlf.: +298 330 330

Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/ur við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Tú finnur samskiftisupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á heimasíðuni www.dat.fo.